gult cyan magenta svart



# Hampiligt summar á Hotel Norð

*Summarið royndist hampiligt á Hotel Norð á Viðareiði, hóast gistingarnar væl kundu verið fleiri*



*Hóast tað bara eru 20 minuttir at sigla úr Klaksvík í Kalsoynna, sum liggur mitt í landinum, er Kalsoyggin at rokna sum útoyggj, tí ferðasambandið ikki er nóg gott*
*Mynd: Edvard Joensen*

EDVARD JOENSEN

**Viðareiði:** Hampiliga væl av fólki hevur vitjað Hotel Norð í summar. Tó mest fólk, sum komin eru framvið og hava stokkið inn á gólvið at fáa sær ein bita. Gistingarnar kundu væl verið fleiri.

Tað skal nógv arbeiði til at fáa eitt hotel í útjaðaranum í Føroyum at bera til, sigur Elisabeth Nybo, sum í summar hevur leigað og rikið Hotel Norð á Viðareiði.

- Um ein ikki hevur hjartað við og arbeiðir einar 18 tímar um samdøgurði, ber tað ikki til, eru hennara royndir frá fyrsta summarinum, hon hevur rikið hotel.

Hinvegin ásannar hon, at marknaðarføringin hevur heldur ikki verið so góð, sum ynskiligt átti at verið. Hon kom seint upp í hetta, sigur hon, og flestu lýsingarbóklingar og tílíkt vóru longu farin á marknaðin. Men tað ætlar hon at bøta um til komandi ár, um hon heldur fram, væl at merkja.

Og ikki hevur hon heilt mist hugin kortini, sigur hon, uttan tó at siga heilt greitt, at hon fer undir at reka hotellið eitt ár aftrat.

Tað, hotellið hevur livað av í summar, eru einstaklingar og bólkar, sum eru komin at fáa sær ein bita ella skipa fyri ymsum tiltøkum. Sjálv byrjaði hon summarið við eini mótasýning í vár, har høvið eisini var at fáa ein bita, umframt at dansað varð út á náttina.

Slíkum tiltøkum hevur hon hug at skipa fyri eisini í heyst og vetur, sigur hon. Eitt nú fer hon at skipa fyri jólaborðhaldum, tá tann tíð kemur. Elisabeth Nybo sigur, at jólaborðhaldini á Hotel Norð fara at verða rímiliga tíðliga í ár. Um mánaðarskiftið november-december. Trý verða tey í alt, sigur hon.

Eisini eru onnur tiltøk, sum hildin verða á hotellinum. Brúdleyp sjálvandi og kanska onkur føðingardagur. Sum konkret dømi nevnir hon, at Klaksvíkar Ítróttarfelag hevur bílagt hotellið til eitthvørt tiltak fyri leikarum, tá landskappingarnar eru endaðar. Og soleiðis eru møguleikarnir fleiri.

Eisini ber til bara at biða um mat av hotellinum. Elisabeth Nybo er útbúgvin kokkur, so tað skuldi ikki verið nakar trupulleiki at fingið ein búff soleiðis av og á. Tað er bara at siga frá, nær og hvussu nógv koma, so kann tað gerast, sigur hon.

Skeiðvirksemi er eisini eitt, hon ætlar at satsa upp á, nú hotellið ikki er opið dagliga í vetur. Sengurnar standa kortini har, og hølini eru til taks. Bæði til størri skeið og til eini tvey smærri. Gistingarmøguleikar eru fyri 30 fólkum. Og skuldi staðið á, verða summarhús leigað á Viðareiði, soleiðis at øll sleppa undir tak, sigur Elisabeth Nybo.

Hóast hotellið er stongt, er tað ikki meira lukkað enn so, at opið er eftir avtalu. Er onkur, sum fegin vil gista eitt vikuskifti, ella bara eina nátt, á Hotel Norð, er bara at ringja til hotellið. Umstilling er til fartelefonina hjá vertinum, um eingin er á sjálvum hotellinum ta løtuna, ringt verður.

Umframt er kiosk á hotellinum, har tað um vikuskiftini ber til at keypa grillmat. Tað vil siga fríggjakvøld og leygarkvøld. Grillmaturin, sum biðið verður um í kioskini, verður so gjørdur í køkinum á hotellinum.

Gistingarnar hava, sum sagt, verið ov fáar á Hotel Norð í summar. Elisabeth Nybo sigur, at tey flestu, sum gist hava, hava verið norðmenn.

At so er, grundar hon á, at hon luttók í eini norskari sjónvarpssending, sum eisini varð víst í SvF fyrr í ár, har hon borðreiddi við lunda. Tað er eingin ivi um, heldur hon, at tann reklaman, hendan sjónvarpssendingin hevur gjørt í Noreg, hevur fingið norðmenninar at biða um at sleppa á Hotel Norð, tá tey eru komin til Føroya í summar.

»Og tey vildu øll smakka lunda«, leggur Elisabeth Nybo, leiðari á Hotel Norð á viðareiði, aftrat.

# Mugu hugsa um annað enn ull

*Skal lív verða útoyggjunum lagað, er neyðugt at hugsa øðrvísi, enn vit vanliga gera. Vit eiga ikki bara at hugsa um ull og vinnufyritøkur, men um lívsvirði sum heild*



*Tað hevur gingið hampuligt hjá Hotel Norð á Viðareiði í summar, men gistingarnar hava verið ov fáar*
*Mynd: Edvard Joensen*

EDVARD JOENSEN

**Klaksvík:** Fólk á útoyggj hava somu ynski og sama lívstørv, sum øll onnur fólk í landinum. Tey vilja eisini hava frítíðarmøguleikar og eitt heilsuverk, sum er at líta á. Fyri ikki at tala um samferðslumøguleikar, sum nógvastaðni eru út av lagi vánaligir, sum er.

Tað er greið tala, Útoyggjanevndin hevur hoyrt, tá hon hevur vitjað á smáplássunum, sigur Olga Biskopstø, samskipari hjá Útoyggjanevndini.

Vit sita á skrivstovu hennara í Klaksvík og tosa um virksemið hjá nevndini. Nevndin hevur nýliga verið í Kallsoynni og tosað við bygdarráðini har, og tað er heilt greitt, hvat fólk á útoyggjunum ynskja. Tey vilja hava somu møguleikar, sum fólk í miðstaðarøkinum.

Fólk vilja hava, at pengar verða brúktir upp á at gera tað liviligt, - og tá meina tey liviligt - á smáplássunum. Cost-benefit hugburðurin má sleppast, og menniskja setast í staðin.

Vit noyðast at ásanna, at tað pengar skulu til, um vit vilja hava fólk at búgva á útoyggjunum. Tey eiga í mest møguleigan at hava teir somu møguleikarnar, sum fólk í miðstaðarøkinum hava. Fótbóltsvallir, ítróttarhallir, svimjihyljar, kvøldskúlar, læknar og alt hitt.

Jú, pengar skulu til. Men tað føroyska samfelagið varðveitir sítt fjølbroytni og virði, sum er neyðugt fyri at hava eitt vælvirkandi samfelag sum heild, sigur Olga Biskopstø.

Um politiskur vilji ikki er at gera tað neyðuga, verða útoyggjarnar avtoftaðar, og so hava vit bara nakrar spøkilsisoyggjar liggjandi eftir. So er at siga tað við reinum orðum, so fólk vita tað og ikki ganga við følskum vónum til tóm lyfti.

Hetta við, at tað skal gerast so ella so fyri at fáa sum best burtur úr ullini, er í lagi sum so. Og sjálvandi vilja fólk á útoyggj eisini finna eina loysn, sum ger, at tað slepst virðiliga av við ullina, sum tey nú einaferð hava. Men tey hava eisini ásannað, at ull er ikki nakað, útoyggjarnar kunnu liva av.

Tað er eisini útoyggjafólkifólki greitt, at tað er trupult at seta stór virki á stovn á útoyggjunum. Hinvegin eigur at bera til at fáa í lag samstarv við virki, har til dømis partframleiðsla kann vera á smáplássunum, soleiðis at lutir til ymiskt, sum framleitt verður á øðrum støðum, kunnu gerast á smáum virkjum. Skipanir við undirleverandørum eru ikki heilt ókendar aðrastaðni. Og ein sonevnd »nichuproduktión« kundi væl borið til á eini útoyggj.

Men tann heilt stóri, afturvendandi trupulleikin hjá fólki, sum býr á útoyggj, er tað vánaliga ferðasambandið. Allastaðni verður vent aftur til, at tað er ov lítið bara at sleppa ein túr av oynni um morgunin, og so ein heimaftur um kvøldið. Samskipanin við aðrar rutur er mangan tung og torfør, og illa gongur hjá fólki aðrastaðni frá at sleppa út til útjaðaran og heim aftur sama dag, um til dømis eitthvørt arbeiði er at gera.

Tað kann vera onkur umvæling á einum ljósmotori úti í Fugloy, sum krevur ein servicemann úr Havn. Hóast arbeiðið kanska kann gerast upp á eina lítla løtu, kann verða neyðugt at seta tveir dagar av til tað, tí ferðasambandið ikki er soleiðis, at tað slepst aftur sama dag.

Eitt annað dømi, Olga Biskopstø, samskipari hjá Útoyggjanevndini nevnir, eru næmingar úr Kallsoynni, sum ganga í framhaldsskúla í Klaksvík. Hóast teinurin millum Klaksvík og Syðradal er stuttur - 20 minuttir eru at sigla - mugu tey fara heiman klokkan seks á morgni og eru ikki heima aftur fyrr enn klokkan seks á kvøldi, hóast skúlin er liðugur um miðjan seinnapartin. Sluppu tey heim beinanveg, tey fingu frí úr skúlanum, var einki fyri at búgva í Kallsoynni

Hinvegin er vandi fyri, at foreldrini ikki vilja hava, at børnini ganga »fyri vág og vind«.

- Hvat verður so gjørt? spyr Olga Biskopstø og svarar sjálv beinanveg.

- Jú, foreldrini flyta til støru plássini fyri at vera har, børnini eru. So er oyggin beinanveg avtoftað.

Og tað er ikki órealistiskt at hugsa og siga so, sigur hon, tí tað eru veruliga nógv dømi um, at soleiðis hevur tað gingið.

Taka vit eitt nú Kallsoynna sum dømi, síggja vit í dag, at tað hevði borið væl til at havt eina livandi oyggj, um samferðslan var góð.

Kallsoyggin liggur jú mitt í landinum, og allir møguleikar fyri eini góðari framtíð eru sum so til staðar. Væl av ungum fólki er, og tey hava hampiligar møguleikar til frítíðarítriv í Mikladali til dømis. Men har, sum so manga staðni, ynskja fólk eisini, at eitt nú heilsuverkið var betri. Fólk ynskja sær til dømis ein økislækna, sum kann taka sær av smáplássunum burturav.

Men eru ferðamøguleikarnir ikki til staðar, er einki at gera kortini. Fyrsta treyt fyri lívi á smáplássunum er, at tað ber til at koma til og frá. Og ynskja politikararnir ikki at brúka pengar upp á smáplássini, skulu teir bara siga tað, so er støðan greið.



# Kunnger›

## um útgjald v.m. av arbei›sloysisstu›li til arbei›sleys á fiskavirkjum

Vi› heimild í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbei›sloysistrygging og arbei›sávísing, § 16, stk. 4 og 5 og § 20, hevur st‡ri› fyri Arbei›sloysisskipanina fyrisett:

*Fiskavirkisskipanin*

**§ 1.** Fiskavirkisskipanin ver›ur í hesi kunnger› n‡tt sum hugtak fyri ta skipan, sum fevnir um rættindi og skyldur hjá teimum fiskavirkjum og persónum, sum koma undir treytirnar í hesi kunnger›.

*Fiskavirki*

**§ 2.** Tey fiskavirki, i› lúka treytirnar í nr. 1-4 ni›anfyri, eru fevnd av hesi kunnger›. Tey skulu:

1. Stø›ugt fáast vi› tilvirking av fiski ella fiskaúrdráttum, sí stk. 4-5 ,
2. hava løggilding ella samsvarandi gó›kenning frá Heilsufrø›iligu Starvsstovuni til tilvirking av fiski,
3. hava uppl‡st Arbei›sloysisskipanini ætla› tal av starvsfólkum, kn‡tt at fiskavirkisskipanini. Uppl‡sta tali› av starvsfólkum skal ikki vera hægri enn samsvarandi tilvirkingarorkuni hjá virkinum, vanliga framlei›slutí› virkisins, og
4. hava sent Arbei›sloysisskipanini skrivliga umsókn um at koma undir fiskavirkisskipanina saman vi› skjalprógvum fyri nr. 1 - 3.

*Stk. 2.* Fiskavirki› skal harumframt fylla út og undirskriva serligt umsóknarbla› frá Arbei›sloysisskipanini. Umsóknarbla›i› vi› ney›ugum uppl‡singum skal vera Arbei›sloysisskipanini í hendi í seinasta lagi 14 dagar eftir, at fiskavirki› hevur lati› Arbei›sloysisskipanini umsókn, sambært stk. 1, nr. 4. Annars fellur umsóknin burtur.
*Stk. 3*. Fiskavirki› hevur skyldu at bo›a Arbei›sloysisskipanini frá øllum broytingum, sum vi›víkja ásetingunum í stk. 1.
*Stk 4.* Talan kann vera um fleiri tí›arskei›, fiskavirki› hevur stø›uga tilvirking í einum ári. Hesi tí›arskei› skulu í minsta lagi ætlast at vara 6 móna›ir innan næsta 12 móna›a skei›i›, og hvørt tí›arskei› skal ætlast at vara longur enn 2 móna›ir.
*Stk. 5.* Fiskavirki, i› eftir ætlan bert tilvirkar fisk ávísar dagar í vikuni, er ikki fevnt av hesi kunnger› tann part av vikuni, tá ongin tilvirking er.
*Stk. 6.* Arbei›sloysisskipanin kann í serligum førum víkja frá freistini, nevndari í stk. 2.

*Arbei›sleysur á fiskavirki*

**§ 3.** Arbei›sleysur á fiskavirki er tann, sum:

1. Hevur setanarligt tilkn‡ti til fiskavirki, sum l‡kur treytirnar í § 2,
2. vegna tí›arbundnan ste›g á fiskavirkinum ver›ur sendur heim. Tí›arbundin ste›gur er í hesi kunnger› at skilja sum ste›gur, i› er íkomin vegna tørvandi feska ráværu ella a›rar líknandi umstø›ur, sí tó § 2 stk. 4 - 5, umframt ste›gur á fiskavirkinum av ø›rum orsøkum, har vi›komandi ver›ur sendur heim í í mesta lagi tvær vikur, og
3. ikki heldur frí frá arbei›num.

*Stk 2.* Persónur, sum:

1. Er í útbúgving í normalarbei›stí›ini,
2. er sjálvstø›ugur vinnurekandi sambært kunnger› um arbei›sloysistrygging fyri sjálvstø›ug vinnurekandi,
3. hevur setanarligt tilkn‡ti til a›rar arbei›sgevarar meira enn 10 tímar um vikuna,
4. fær arbei›sloysisstu›ul annars, ella
5. kemur undir ásetingarnar í § 6, stk. 3 og 4

ver›ur ikki mettur sum arbei›sleysur á fiskavirki.
*Stk. 3.* Hjá persóni, sum sambært avtalu vi› fiskavirki› ikki arbei›ir fulla tí›, ver›a tímarnir nevndir í stk. 2, nr. 3 ásettir lutfalsliga hægri. Fyri arbei›sleys á fiskavirki, i› kemur undir treytirnar í § 2, stk. 5, ver›a tímarnir nevndir í stk. 2, nr. 3 somulei›is ásettir lutfalsliga hægri.

*Rætt til útgjald og útrokningargrundarlag*

**§ 4.** Arbei›sleysur á fiskavirki hevur rætt til arbei›sloysisstu›ul, tá vi›komandi:

1. Hevur lati› Arbei›sloysisskipanini skrivliga umsókn,
2. l‡kur ásetingarnar í § 3,
3. er fyltur 16 ár, men ikki 67 ár,
4. hevur bústa› í Føroyum, og
5. er tøkur til arbei›i fyri fiskavirki›.

*Stk. 2.* Harumframt skal tann arbei›sleysi geva Arbei›sloysisskipanini tær uppl‡singar, sum Arbei›sloysisskipanin metir ney›ugar fyri at veita arbei›sloysisstu›ul. Hesar uppl‡singar skulu gevast á serligum umsóknarbla›, sum Arbei›sloysisskipanin fl‡ggjar tí arbei›sleysa.
*Stk. 3.* Arbei›sloysisstu›ulin ver›ur útgoldin frá tí degi, tann arbei›sleysi letur Arbei›sloysisskipanini umsókn um arbei›sloysisstu›ul sambært stk. 1 og uppl‡singar sambært stk. 2, tó treyta› av, at a›rar reglur í løgtingslóg um arbei›sloysistrygging og arbei›sávísing ella kunnger›um ikki for›a fyri útgjaldi. Arbei›sloysisskipanin kann loyva eini 14 daga freist til tann arbei›sleysa at útvega uppl‡singar sambært stk. 2. Um tann arbei›sleysi ikki innan freistina hevur givi› Arbei›sloysisskipanini ásettu uppl‡singarnar, fellur umsóknin um arbei›sloysisstu›ul sambært stk. 1 burtur.
*Stk. 4.* Útrokningargrundarlagi› fyri arbei›sleys á fiskavirkjum er sambært §§ 15 og 16 í løgtingslóg um arbei›sloysistrygging og arbei›sávísing.
*Stk. 5.* Arbei›sloysisskipanin kann í serligum førum víkja frá freistini, nevndari í stk. 3.

**§ 5.** Arbei›sloysisstu›ul ver›ur rokna›ur eina fer› um vikuna frá og vi› 9. arbei›sloysistíma.
*Stk. 2.* Fyri arbei›sleys, sum sambært avtalu vi› fiskavirki› ikki arbei›a fulla tí›, ver›ur arbei›sloysisstu›ul rokna›ur vi› einum lutfalsliga lægri tímatali. Fyri arbei›sleys á fiskavirki, i› kemur undir treytirnar í § 2, stk. 5, ver›ur arbei›sloysisstu›ulin somulei›is rokna›ur vi› einum lutfalsliga lægri tímatali.

*Onnur inntøka*

**§ 6.** Arbei›sloysisstu›ulin ver›ur skerdur eftir stk. 2 vi› ø›rum A-inntøkum - írokna› frítí›arløn, undantiki› arbei›sloysisstu›linum og A-inntøkum, sum eru undantiknar gjaldsskyldu, sambært § 8 í løgtingslóg um arbei›sloysistrygging og arbei›sávísing, sum tann arbei›sleysi vinnur í vikuni, hann fær arbei›sloysisstu›ul.
*Stk. 2.* Tann parturin av vunnu A-inntøkuni sambært stk. 1, sum er oman fyri eina vanliga vikuløn sambært ásetingunum í § 16, stk. 3 í løgtingslóg um arbei›sloysistrygging og arbei›sávísing, ver›ur umrokna›ur til tímar, sum arbei›sloysisstu›ul ikki ver›ur goldin fyri. Tímarnir ver›a rokna›ir sum vunna A-inntøkan í vikuni, b‡tt vi› eini upphædd, sum ver›ur rokna› solei›is: Hægsti dagligi arbei›sloysisstu›ul sambært § 16, stk. 2 í løgtingslóg um arbei›sloysistrygging og arbei›sávísing b‡tt vi› 8, falda› vi› 1,15.
*Stk. 3.* Um tann arbei›sleysi í 8 vikur á ra› hevur vunni› A-inntøku frá ø›rum arbei›sgevarum enn frá fiskavirkinum, vi›komandi hevur tilkn‡ti til, og arbeidda tí›arskei›i› fyri hvørja viku sær er meira enn 10 tímar, ver›ur vi›komandi ikki rokna›ur sum arbei›sleysur á fiskavirkinum meira og fær ongan arbei›sloysisstu›ul eftir hesi kunnger›, uttan vi› at lata inn n‡ggja umsókn um arbei›sloysisstu›ul sambært § 4.
*Stk. 4.* Um tann arbei›sleysi í 8 vikur á ra› ikki hevur havt arbei›stímar á tí fiskavirki, vi›komandi hevur tilkn‡ti til, ver›ur vi›komandi ikki rokna›ur sum arbei›sleysur á fiskavirkinum meira og fær ongan arbei›sloysisstu›ul eftir hesi kunnger›, uttan vi› at lata inn n‡ggja umsókn um arbei›sloysisstu›ul sambært § 4.
*Stk. 5.* Fyri arbei›sleys, sum sambært avtalu vi› fiskavirki› ikki arbei›a fulla tí›, ver›a ásetingarnar í stk. 3 rokna›ar vi› einum lutfalsliga hægri tímatali. Fyri arbei›sleys á fiskavirki, i› kemur undir treytirnar í § 2, stk. 5, ver›a ásetingarnar í stk. 3 somulei›is rokna›ar vi› einum lutfalsliga hægri tímatali.

*Avgrei›sla av útgjaldi*

**§ 7.** Arbei›sloysisstu›ulin ver›ur útgoldin eftir hvørt útgjaldsskei›, ásett av Arbei›sloysisskipanini. Eitt útgjaldsskei› fevnir um 14 álmanakkadagar og í mesta lagi 8 útgjaldsdagar.
*Stk. 2.* Arbei›sloysisstu›ulin ver›ur, eftir vanligu reglunum í skattalógini um útgjald av A-inntøkum, ávístur tí arbei›sleysa eftir hvørt útgjaldsskei›, vi› tí freist, Arbei›sloysisskipanin hevur fyri ney›ini til at avgrei›a útgjaldi›.

**§ 8.** Á›renn arbei›sloysisstu›ulin ver›ur útgoldin, skal tann arbei›sleysi lata inn FV-kort til Arbei›sloysisskipanina fyri ta› útgjaldsskei›, sum vi›víkur arbei›sloysisstu›linum.
*Stk. 2.* FV-korti› skal latast inn sambært teirri freist og á tí sta›i, sum ásett eru av Arbei›sloysisskipanini. Um FV-korti› ikki ver›ur lati› inn rættstundis, missir tann arbei›sleysi arbei›sloysisstu›ulin ta› tal av útgjaldsdøgum, sum FV-korti› er lati› inn ov tí›liga ella ov seint, í tí útgjaldsskei›num, FV-korti› vi›víkur.
*Stk. 3.* Á FV-kortinum skal tann arbei›sleysi, eftir nærri ásetingum frá Arbei›sloysisskipanini, geva uppl‡singar, sum Arbei›sloysisskipanin metir eru ney›ugar fyri at gjalda út arbei›sloysisstu›ulin, heruppií uppl‡singar um arbeiddar tímar og vunna A-inntøku í útgjaldsskei›num.
*Stk. 4.* Tann arbei›sleysi skal venda sær til fiskavirki› ella anna› sta›, sum ver›ur ávíst av Arbei›sloysisskipanini, fyri at útvega sær FV-kort.
*Stk. 5.* Um Arbei›sloysisskipanin ella fiskavirki› hava forprenta› uppl‡singar á FV-korti›, t.d. navn og bústa› hjá tí arbei›sleysa ella uppl‡singar um arbei›stímar og vunna A-inntøku í útgjaldsskei›num, hevur tann arbei›sleysi skyldu at gera vart vi› møguligar skeivleikar í hesum uppl‡singum.
*Stk. 6.* Arbei›sloysisskipanin kann krevja, at rættleikin í uppl‡singunum á FV-kortinum skal váttast av tí ella teimum arbei›sgevarum, sum tann arbei›sleysi hevur arbeitt hjá í útgjaldsskei›num.
*Stk. 7.* Um tann arbei›sleysi heldur frí ella av a›rari orsøk ikki er tøkur til arbei›i fyri fiskavirki›, sí § 4 stk. 1, nr. 5, skal tann arbei›sleysi skrivliga bo›a frá hesum á FV-kortinum. Í tílíkum førum kann víkjast frá treytunum í stk. 2 um innan hvørja freist, FV-korti› skal latast inn.
*Stk. 8.* Arbei›sloysisskipanin kann í serligum førum geva loyvi til, at onnur skrivlig fróbo›an ver›ur n‡tt í sta›in fyri FV-korti›.

**§ 9.** Arbei›sloysisskipanin kann áleggja fiskavirkinum at geva uppl‡singar á FV-kortinum eftir nærri ásetingum frá Arbei›sloysisskipanini, og sum Arbei›sloysisskipanin metir eru ney›ugar fyri at gjalda út arbei›sloysisstu›ulin.

*Reglur annars*

**§ 10.** Henda kunnger› fær gildi frá 25. september 2000.

St‡ri› fyri Arbei›sloysisskipanina, 24. august 2000

Karin Kjølbro (sign.) forma›ur

/Elisabeth O. Gaardbo (sign.)

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stu›ul til arbei›sleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbei›sleysum at fáa arbei›i og at umsita arbei›sávísing fyri føroyska arbei›smarkna›in. Á ALS starvast í løtuni 22 fólk. Virksemi› hjá ALS er í høvu›sheitum lógarásett. Ovastu lei›sluna hevur st‡ri› fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbei›sgevara- og løntakarafeløgunum á arbei›smarkna›inum - ver›ur valt av Føroya Landsst‡ri.*

ALS

Arbei›sloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
teldupostur: als@als.fo